# Vinnan

VINNUTÍÐINDI í Sosialinum fast hvønn týsdag
– eisini aðrar dagar




*18 fólk doyðu, tá grótskipið "Rocknes" holvdist uttan fyri Bergen í januar í 2004. Seinni eydnaðist at venda skipinum og at umvæla tað. Í dag eitur tað "Nordnes". (Mynd: Aftenposten)*

# Skipsvanlukkur kannast eins og flogvanlukkur

**Í Noregi fara tær vanligu sjófrágreiðingarnar aftan á skipsvanlukkur í søguna um stutta tíð, tí í framtíðini skal ein skaða- ella vanlukkunevnd kanna tilburðirnar**

SJÓVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Frá 1. juli í ár skulu fólk, sum eru vitni til eitt óhapp ella eina vanlukku á sjónum, svara spurningum frá einari serligari skaðanevnd. Sama dag fara sjófrágreiðingarnar, sum vit kenna, í søguna, og somu lagnu fáa tey seks eftirlitsstørvini í norsku sjóvinnuni.

Spurningurin um at skipa eina skaðanevnd til óhapp og vanlukkur á sjónum hevur verið til umrøðu í Noregi í mong ár, og aftan á drúgva viðgerð, hoyringar og politiskt orðaskifti er klárt at seta nýggju skipanina í verk tann 1. juli í ár. Frá tí degi fáa óhapp og vanlukkur á sjónum viðgerð eftir sama leisti, sum flogvanlukkur og tokvanlukkur fáa í dag.

Formaðurin í nýggju skaðanevndini fyri tilburðir á sjónum, William Bertheussen, sigur við NTB, at tann nýggja skipanin verður ein fyrimunur fyri vitnini, tí nú fáa tey frið til at siga tað, sum tey vita. Tað verður eisini ein fyrimunur fyri nevndina, tí tað verður lættari at fáa tað týdningarmesta fram, sigur hann.

- Høvuðsuppgávan hjá nevndini verður at staðfesta, hví eitt óhapp ella ein vanlukka er hend, so vit kunnu læra av tí og fyribyrgja, at tað hendir aftur, sigur William Bertheussen.

Nýggja skaðanevndin skal kanna tilburðir við ferðamannaskipum og aðrar skipsvanlukkur ella -óhapp, har fólk fáa skaða.

Nevndin hevur enki við tann revsirættarliga partin av gera, tí ta uppgávuna fær tann nýggja sjóferðsluløgreglan, sum hevur heimstað í Stavanger. Hon verður skipað í fleiri deildum ella eindum, og skipanin líkist tí, sum er galdandi fyri óhapp ella vanlukkur í oljuvinnuni.

# Føroya Kolvetni rimmar hál í Norðsjónum

LEITILOYVI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni ella rættari tess dótturfelag í Noregi hevur gjørt eitt rimmar hál í norska partinum av Norðsjónum. Felagið hevur í dag fingið tillutað ikki færri enn 5 nýggj leitiloyvi á norska landgrunninum. Við hesum hevur felagið nú tilsamans 11 leitiloyvi í norskum øki. Av teimum fimm nýggju loyvinum hevur felagið bundið seg til at bora ein brunn. Í undanfarnum loyvi skal felagið bora tveir brunnar. Nils Sørensen, stjóri er sera fegin um úrslitið av útbjóðingini:

– Hetta passar sum fótur í hosu í okkara vakstrarstrategi, har vit m.a. meta júst norskt øki sum sera áhugavert. Faroe Petroleum, Norge lat herfyri upp skrivstovu í Stavanger. Hetta er krav til feløg, sum virka í norskum øki. Afturfyri fáa tey afturgoldið 78% av øllum útreiðslum, sum hava sambandi við leiting. Tá tey finna olju skulu tey so rinda 78 í skatti av øllum inntøkum.



*Nils Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum er fegin um úrslitið av norsku útbjóðingini*